Sosialurin



# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

**Bilradio á Rás2**
**hósdagin kl. 16.05**

# Ivan Bilar størsta bilasølan




**Ivan Bilar hevur seinastu árini vunnið ein støðugt vaksandi marknaðarpart av føroyska bilamarknaðinum, og í 2009 gjørdist teir so nummar eitt, sum største bilasølan í landinum**

BILASØLA

Endaligu tølini fyri bilasøluna í Føroyum í 2009 staðfesta, at bilasølan Ivan Bilar við Hoyvíksvegin nú er størsta bilasølan í landinum. Í 2009 seldi Ivan bilar 175 bilar, meðan næststørsta bilasølan á listanum seldi 131 bilar. Ivan bilar selur bilmerkini Citroën, Mitsubishi, Mercedes Benz og Chrysler.

Tað er serliga Citroën, sum hevur verið millum fýra tey mest seldu bilamerkini í Føroyum seinastu fimm árini. Stóran part av 2009 var Citroën nummar eitt, men endaði tó á øðrum plássi, tá árið var úti. Hóast Mercedes Benz ikki hevur so stóran marknaðarpart, so er sølan av Mercedes Benz bilum nógv vaksin seinastu árini. Sølan av Mitsubishi er eisini nógv vaksin, meðan sølan av Chrysler hevur verið meira støðug.

Ivan Bilar hevur góðar vónir um bilasøluna í 2010. Hetta kemst millum annað av nýggja samleikanum hjá Citroën, sum fer at koma við nógvum spennandi nýggjheitum í nærmastu framtíð, nýggja prísbygnaðinum hjá Mercedes Benz og Mitsubishi, sum hevur umhvørvisvinarligasta bilin í Colt klassanum. Harumframt fara vit í holt við stórar moderniseringar av hølisviðurskiftunum í nærmastu framtíð, sigur Pauli Waag sølustóri hjá Ivan bilum.




*Citroën varð bestseljarin hjá Ivan Bilum í 2009*



*Biltjóvarnir gera sær dalt av, at bilar ganga í tómgongd, meðan kavin tiðnar av rútunum*

# Biltjóvarnir ganga ikki í tómgongd

Í nógva kuldanum og kavanum sum hevur verið, er tað vanligt, at bilar standa í eini innkoyring við motorinum í gongd, meðan eigarin ger seg kláran til at fara frá húsum um morgunin.

Meðan bilarnir ganga í tómgongd, ganga biltjóvarnir ikki í tómgongd. Í Danmark hava biltjóvar gjørt sær dalt av hesum og hava stolið nógvar bilar. Teir gera skjótt av og stjala bilarnar úr túninum hjá fólki, áðrenn tey náa at reagera upp á tað sum er hent, sigur Henrik List frá Østjyllands Politi við heimasíðuna BT.dk.

# Elbilur við battarískiftiskipan

**Nú nærkast elbilarnir av álvara. Fyrsti bilur ið kemur á marknaðinum við battarískiftiskipan verður Renault Fluence, sum kemur á danska marknaðin næsta ár**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Meðan veðurlagstoppfundurin COP15 var í Keypmannahavn í desember vóru nógvir ymiskir elbilar sýndir fram. Ein tann mest áhugaverdi var helst Renault Fluence, sum er flaggskipið í elbilaflotanum hjá Renault. Bilurin, sum kemur á danska marknaðin næsta ár, verður fyrsti bilur á marknaðinum við møguleika til at kunna skifta battarí, ístaðin fyri at skula løðast upp frá eini stikkkontakt.

Talan verður um ein bil við 95 hk (ella umleið 70 kW) elmotori og einum botntrekki upp á 220 Nm. Bilurin kann koyra millum 130 og 200 km til upp á eitt 24 kWh battarí, alt eftir hvar bilurin koyrir og hvussu skótt verður koyrt.

Í Danmark kemur bilurin at kosta nakað tað sama sum ein Renault Mégane (umleið kr. 250.000) Prísurin á bilinum er uttan battarí, sum verða leigað frá Renault ella Better Place í Danmark.




*Renault Fluence verður fyrsti bilur á marknaðinum við møguleika til at kunna skifta battarí*